# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Kyndil-Tjaldur 15-22 (11-12):

# Tjaldur er nú oddalið

**Við sigri á Kyndli í gjár hava kvinnurnar hjá Tjaldri laft seg á fremsta plássið í Sunset-deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann væl vera, at Stjørnan aftur vinnur seg á oddasessin, tá tær um vikuskiftið spæla heimadyst móti Neistanum.

Men við sigrinum á Kyndli í gjárkvøldið hevur Tjaldur sett seg á oddasessin, og tað markerar enn einaferð, at uppflytararnir veruliga hava stórar ætlanir í vetur.

### Vunnu seinna hálvleik

Í gjár var tó ikki alla tíðina so greitt, hvønn vegin tað skuldi bera. Fyri steðgin var Kyndil væl og virðiliga við í dystinum, og Tjaldur fekk sjáldan leysar teymar til at gera nakað sum helst.

Men hetta vendi fullkomuliga eftir steðgin. Tjaldur vann seinna hálvleik somikið greitt sum 10-4, og seinastu 20 minuttirnar av dystinum fekk heimaliðið bara tvey mál.

Sum ikki einaferð, so vóru tað útlendsku spælararnir hjá Tjaldri, sum ginu á odda við málskjótingini. Við Alinu Olaru og Adinu Petrea hevur Tjaldur tveir skjúttar av format, sum væl kunnu gera lívið trupult fyri allar verjur í landinum. Hinvegin er stóri spurningurin, hvussu breiddin í álopinum er, um hesar báðar verða steðgaðar.



*Alina Olaru og Tjaldur eru nú á odda í Sunset-deildini í hondbólti*

*savnsmynd*

## FAKTA

**Kyndil-Tjaldur 15-22 (11-12)**
10 min: 3-5
20 min: 9-8
40 min: 13-14
50 min: 13-18
**Málskjúttar**
**Kyndil**: Jacklin Durhuus 7(2), Marina Zilko 3, Halla Midjord 2, Rakul N. Joensen 2, Linda Johannesen 1
**Tjaldur**: Adina Petrea 8(1), Alina Olaru 6, Annika Thomsen 3, Jóhanna í Króki 2, Mary-Ann Isaksen 1, Benadikta Johannesen 1, Heidi Sevdal 1
**Brotskøst**: Kyndil 3, Tjaldur 1
**Útvísingar**: Kyndil 4, Tjaldur 2
**Dómarar**: Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

**Sunset-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 73 | 62 | 11 | 5 |
| 2 | Stjørnan | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 56 | 38 | 18 | 4 |
| 3 | VB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 87 | 74 | 13 | 4 |
| 4 | Neistin | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 55 | 42 | 13 | 3 |
| 5 | StÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 90 | -23 | 0 |
| 6 | Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 51 | 83 | -32 | 0 |

StÍF-VB 27-36 (13-20):

# VB-veitsla á Skála

**Kvinnurnar hjá VB høvdu ongar trupulleikar av StÍF, tá liðini dystaðust á Skála mikukvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn sum áður er VB eitt av liðunum, sum roknast skal við í føroyskum kvinnuhondbólti.

Hetta settu VB-kvinnurnar enn eina tjúkka striku undir, tá tær vitjaðu á Skála mikukvøldið. Longu fyrstu minuttirnar stóð greitt, at á degnum fekk StÍF ikki gjørt tað heilt stóra við mótstøðuna, sum bara trumlaði avstað. Daiva Touamita var í vanliga stórforminum, og eisini var Gurið Mortensen heilt væl fryri, og tá munurin eftir fyrsta korterið hevði sníkt seg upp á seks mál, var restin av dystinum bara ein spurningur um at fáa tíðna at ganga.

Og tíðinda nýtti VB so til at dusa sær í sannari málveitslu, hóast tær eftir steðgin ikki hildu heilt sama tempo í spælinum. Nakað sum tó heldur ikki var so alneyðugt, tá sigurin longu var mest sum tryggjaður.

## FAKTA

**StÍF-VB 27-36 (13-20):**
10 min: 3-5
20 min: 8-13
40 min: 16-27
50 min: 21-30
**Málskjúttar**
**StÍF**: Rebekka Justinussen 8(1), Ninna K. Johansen 7(3), Bára Berthelsen 6, Signhild Petersen 2, Fríðrunn Danielsen 2, Sunfríð Johansen 1, Poula D. Olsen 1
**VB**: Daiva Toumaite 13(5), Theresa Joensen 7, Svava Vestergaard 4, Laila Jespersen 4, Bára Mortensen 2, Theresa Joensen 2, Una Egilsdóttir 2, Sára Samuelsen 1, Monika Samuelsen 1
**Brotskøst**: StÍF 4, VB 5
**Útvísingar**: StÍF 4, VB 4
**Dómarar**: Kristian Joensen & Karstin Joensen